Verksmiðjuflotin:

# Prísvøkstur uppvigar fall í veiðinøgd

**Samanumtikið verður roknað við, at rakstrarúrslitið fyri hvørt skipið verður nakað betri í ár enn í fjør**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Verksmiðjutrolararnir hava havt rímiliga góð ár, og flotin er rímiliga væl fyri við árslok 2004.

- Hóast broytingar í miðalprísi seinastu 5 árini, hevur raksturin verið stabilt góður.

Sambært greiningini hjá Rasmussen & Weihe verður mett, at vøksturin í prísi hevur uppvigað minkingina í veiðinøgd frá 2003 til 2004.

- Sambært teimum upplýsingum, vit hava fingið um gongdina í 2005 hjá verksmiðjutrolarunum, minkar veiðinøgdin nakað í 2005 í mun til sama tíðarskeið í 2004. Hinvegin er miðalprísurin hækkaður í ár, og ber hetta við sær, at samlaða veiðivirðið veksur nakað.

Grannskoðarafelagið heldur, at árið í ár soleiðis sær út til at geva umleið sama rakstrarúrslit sum árið í fjør, tó kanska nakað lakari, tá ið hædd verður tikin fyri høgu oljuprísunum.

- Leggjast skal aftrat, at færri verksmiðjutrolarar hava fiskað kvoturnar í 2005, og tí vænta vit samanumtikið, at rakstrarúrslitið fyri hvørt skipið verður nakað betri í ár enn í fjør, sigur felagið.

Skipini, sum eru við í hesum skipabólki, eru Vesturvón, Akraberg, Skálaberg, Sundaberg, Enniberg og Ljósafelli.

Miðalaldurin hjá hesum parti av flotanum er 16 ár. Nýggjasta skipið er Skálaberg, sum kom í flotan í 2003.




*Veiðinøgdin hjá verksmiðjutrolarunum er minkað, men prísirnir eru hækkaðir*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*




*Garnaskipini høvdu besta árið í 2000, men síðan hevur gingið aftur á. Nú verður so aftur roknað við eini framgongd í ár*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Garnaskip:

# Framgongd er væntandi

**Samanumtikið kann sigast, at garnaskipini høvdu besta árið í 2000, men síðan hevur gingið aftur á. Ársúrslitið er minkað frá 2000 at rokna, og er við árslok 2004 vent frá avlopi til hall**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Árini 2000 og 2001 royndust væl, men bæði 2002, 2003 og 2004 hava roynst minni væl.

- Samlaða fallið í nettosølu frá 2000 til 2004 er stívliga 40%, vísa Rasmussen & Weihe á.

Garnaskipini høvdu í 2004 eitt lakari úrslit enn árið fyri.

- Sambært hagtølum hjá Føroya Fiskimannafelag fyri teir fyrstu níggju mánaðirnar í ár, er miðalprísurin hjá garnaskipum lækkaður 10% samanborið við somu tíð í fjør. Haraftrat kemur, at samlaða veiðinøgdin er minkað við 16%. Her skal tó havast í huga, at tølini fyri 2005 fevna um veiðina hjá 6 skipum í mun til 7 skip í 2004.

Rasmussen & Weihe staðfesta tí, at samlaða veiðivirðið tískil er umleið 10% betur fyrstu níggju mánaðirnar í 2005 í mun til somu tíð í fjør.

- Vit vænta, at garnaskipini fara at hava eina ávísa framgongd í rakstrinum í 2005 í mun til árið fyri, heldur felagið.

Samanumtikið kann sigast, at garnaskipini høvdu besta árið í 2000, men síðan hevur gingið aftur á.

- Ársúrslitið er minkað frá 2000 at rokna, og er við árslok 2004 vent frá avlopi til hall.

Sambært greiningini hjá Rasmussen &

Weihe hevur ognaravkastið hjá garnaskipum verið á einum lágum støði í 2002 og 2003 og er vorðið negativt í 2004. Sama er við renting av eginogn.

- Gjaldførið er nøkulunda gott, tó at tað er minkað síðan 2001. Soliditeturin er støðugt øktur fram til 2002, men fall í 2003 og 2004, hóast hann enn er góður, sigur felagið.

Miðalaldurin hjá garnaskipum er 37 ár.

Línuskip:

# Útlitini eru tey somu sum í fjør

**Mett verður, at rakstrarúrslitið hjá línuskipunum í ár verður umleið tað sama sum í fjør**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipaflotin hevur havt nøkur góð ár og er rímiliga væl fyri. Skipini hava havt ein støðugan vøkstur fram til 2003, sum gjørdist eitt serstakliga gott ár hjá hesum skipabólki.

- Men positiva gongdin vendist í 2004, tá ið samlaða úrslitið fyri skipabólkin gjørdist eitt hall.

Soleiðis broyttist metúrslitið í 2003 vegna minkandi veiðinøgd og lægri fiskaprís til eitt hall longu árið eftir.

Línuskipini hava merkt eina støðuga minking í miðalprísinum árini frá 2001 til 2004, og samlaða fallið fyri tíðarskeiðið 2000 til 2004 er stívliga 27%. Hinvegin er veiðinøgdin í sama tíðarskeiði økt við 72%.

Rasmussen & Weihe vísa á, at sambært hagtølum hjá Føroya Fiskimannafelag hava línuskipini merkt eina afturgongd í veiðinøgd upp á 16% níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár samanborið við somu tíð í fjør.

- Men hinvegin er miðalprísurin hækkaður við stívliga 13%, soleiðis at veiðivirðið einans er minkað við 2%. Tí vænta vit, at rakstrarúrslitið hjá línuskipunum í ár verður umleið tað sama sum í 2004.

Íløgurnar, sum línuskipini hava gjørt seinastu 4-5 árini, hava verið stórar. Tøki peningurin øktist nógv árini 2000 til 2003, men var við árslok 2004 aftur á sama støði sum í 2000.

Eginognin hjá línuskipum vaks nógv til og við ár 2003, men minkaði síðan 18% í 2004.

- Havast skal í huga, at skipatalið er økt seinastu árini, og hetta saman við øktum skipavirði við eitt nú umbyggingum og nýíløgum er samlaða skuldin hjá línuskipum nærum tvífaldað árini 2000 til 2004, siga Rasmussen & Weihe.

Lagt verður aftrat, at gjaldførið hjá hesum skipabólki er minkað javnt hesi árini, og ein orsøk til hetta er, at tøkur peningur er nýttur til íløgur.

- Soliditeturin er rímiligur við árslok 2004, hóast hann er lækkaður munandi hesi árini, sigur felagið.

Miðalaldurin hjá línuskipum er 35 ár.




*Íløgurnar, sum línuskipini hava gjørt seinastu 4-5 árini, hava verið stórar. Tøki peningurin øktist nógv árini 2000 til 2003, men var við árslok 2004 aftur á sama støði sum í 2000*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*